

Øll 365 børnini stillaðu upp sum eitt 70-tal í skúlagarðinum við hvør sínari ballón
Mynd: Jens Kristian Vang

Sankta Frans Skúli 70 ár:

# 365 ballónir upp í luftina í senn

**Mánadagin 8. desember eru liðin 70 ár síðan Sankta Frans Skúli í Havn bleiv vígdur. Fyrstu franciskanarasystrarnar komu til Havnar í 1931, og byrjaðu tær skúla í Bringsnagøtu í húsunum hjá Klett**

FØÐINGARDAGUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Mánadagin var hátíðardámur í Sankta Frans Skúla, tá skúlin fylti 70 ár.



*Skúlastjórin Selmar Jacobsen hevði eisini ballónir*
Mynd: Jens Kristian Vang



*Systir Cecilia er enn knýtt at skúlanum. Hon undirvísir nakrar tímar um vikuna*
Mynd: Jens Kristian Vang



*70 ár síðan Sankta Frans Skúli varð vígdur*
Mynd: Jens Kristian Vang

Skúlabørnini

fingu ein annarleiðis dag. Tey møttu á skúlanum til eina hugnaløtu, og klokkan 10 fóru øll tey 365 børnini út í garðin við hvør sínari ballón og stillaðu seg upp í rekkju sum eitt 70-tal. Ballónirnar vóru í føroysku litunum, hvítar, reyðar og bláar. Inni í hvørjari ballón var ein seðil við eini persónligari heilsan frá hvørjum barni, soleiðis at um onkur finnur seðilin, kunnu tey seta seg í samband við Sankta Frans Skúla. Tey eru áhugaði at vita nær og hvar seðilin varð funnin.

Aftaná vóru børnini boðin til kakao og bollar, og foreldrini fingu kaffi og køkur á lærarastovuni.

Fyrstu franciskanarasystrarnar komu til Havnar við DFDS ferðamannaskipinum Dronning Alexandrine á kvøldið tann 24. apríl 1931. Sama árið byrjaðu tær skúla í Bringsnagøtu í húsunum hjá Klett, næmingatalið lá um 25. Í 1932 stovnaðu tær ein barnagarð til umleið 20 børn. Tann nunnuskipan, sum franciskanarasystrarnar í Havn hoyra til, varð stovnað í 1876.

Í 1932 keypa franciskanarasystrarnar saman við bispadøminum í Keypmannahavn økið niðan fyri Viðarlundina, og árið eftir varð farið í gongd við at byggja skúla, kirkju, kleystur og barnagarð. Talan var um ein stóran bygning, sum H.C.W. Tórgarð arkitektur hevði teknað.

Kirkjuvígslan var 19. november, og skúlin varð vígdur 8. desember 1933. Umleið 60 fólk vóru samankomin, og katólski presturin Boekenoogen vígdi skúlan. Til vígsluna vóru millum onnur M.A. Jacobsen, borgarstjóri, Símun av Skarði, háskúlastjóri, Zachariassen, amtslækni og umboð fyri føroysku bløðini.

Sankta Frans Skúli varð øll tey fyrstu árini og líka til 1952 rikin sum privatskúli, uttan almennan stuðul. Fyrsti føroyski skúlastjórin var Bjarni Skaalum. Hann byrjaði sum lærari á skúlanum í 1967 og frá 1973-80 var hann varaskúlastjóri og skúlastjóri frá 1980-97. Áðrenn Bjarna Skaalum var systir Stinissen skúlastjóri.

1. apríl 1985 yvirtók Tórshavnar kommuna skúlan. Skúlastjóri í dag er Selmar Jacobsen, hann tók við í 1997. Á skúlanum ganga 356 børn og 29 lærarar eru knýttir at skúlanum

Síðan skúlin av fyrstan tíð varð tikin í brúk, er hann nakrar ferðir útbygdurur eins og skúlagarðurin eisini er víðkaður. Ætlanir eru frammi um at byggja ein nýggjan bygning við fýra skúlastovum.

*Kelda. Sankta Frans Skúli v. Erhard Jacobsen*



# Eivør innstillað til heiðurslønir

**Eivør Pálsdóttir er innstillað til 3 tónleikaheiðurslønir í Íslandi. Væl gongur við nýggju fløguni í Íslandi og er hon nú nummar 13 á íslendska top 15. Bólkurin Týr er framvegis nummar eitt við Wild Rover á einasta íslendska hittlistanum, ið kann sammetast við okkara 15 tær bestu**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Eivør Pálsdóttir er innstillað til 3 íslendskar tónleikaheiðurslønir av Íslensku Tónlistarverðlaunin, og kann hetta metast sum eitt slag av íslendskum Grammy Awards. Eivør er við í kappingini um virðislønirnar innan Besti sangari (Best Performer) 2003, besta songkvinna 2003 og besta fløga 2003.

Hetta gevur vind í seglini, tí nógv umrøða stendst av hesum og er hetta samstundis ein viðurkenning í sjálvum sær.Tey innstillaðu eru sjálvsagt umrøðuevni í túnatosi og har fólk koma saman.

Heimildarmaður okkara í Íslandi, Jens Guð, sigur seg meta, at Eivør hevur góðar møguleikar í kappingini um at gerast Besta Songkvinna 2003, tí tað er hon veruliga, metir Jens Guð, og tað verður ikki lætt at velja nakran annan, leggur hann afturat.

Møguliga hevur hon ein møguleika at gerast besti sangari, men her ivast Jens Guð eitt sindur. Og hann metir ikki, at hon fær fyri bestu fløgu - eisini orsakað av, at hon helst verðrur besta songkvinna og ivasamt er um hon fær bæði í posa og sekk.

Nýggja fløgan hjá Eivør, Krákan, hevur verið á Top 15 í seks vikur og hevur verið uppi á nummar 5 og er nú nummar 13. Hetta merkir helst, at Krákan verður seld í fleiri enn 10.000 eintøkum í Íslandi.

### Týr nummar eitt

Bólkurin Týr er framvegis nummar eitt á Samfés, ið er hittlisti, ið kann metast við okkara 15 tær bestu. Skúlabørn atkvøða og Týr sigst liggja á odda við fleiri enn 100 atkvøðum frammanfyri næsta lag.

Til ber at lurta eftir listanum á www.ruv.is og at listin sæst á www.samfes.is/utvarp/vinsaeldalisti.

